# Eftir veðrum í Skorunum í Hattarvík

Tað eru nøkur ár síðani, at tey byrjaðu at sleppa út í Skorarnar. Vanligt hevur verið, at veðrarnir verða loraðir niður í bát og síðani sigldir heim, men trý tey seinastu árini hevur tyrla tikið veðrarnar og flogið teir heim í bygdina. Fyri viku síðani vóru menn í Skorunum eftir veðrum og fingu teir 28 av 35 heim við



SKURÐTÍÐ

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Ólavur Sjúrðarberg*

Í 1999 leyp í Skorunum í Hattarvík. Áðrenn tað gingu eini 80 seyðir har um summarið – 27 ær og so lomb og veðrar. Við omanlopinum varð vanliga farleið teirra burtur.

Í 2000 gjørdu menn av at sleppa góðar 40 veðrar út. Tá so farið var eftir teimum aftur, vórðu teir riknir oman á helluna. Veðrarnir vórðu síðani bundnir niður, og so loraðir tveir og tveir niður fyri 50 metrar høga bakkan niður og í bátin, sum síðani førdi seyðin heim til Hattarvíkar. Ógvuliga baksut var hetta, og haraftrat mátti altíð takast hædd fyri sjónum og hvussu hann skikkaði sær.

Hetta er síðani broytt og seinastu trý árini hevur ein tyrla ført seyðin heim í bygdina, og soleiðis var eisini farna vikuskiftið, tá menn aftur vóru í Skorunum eftir veðrum.

### Tólv tímar burtur

Klokkan sjey á morgni fóru menn frá húsum. Ein tíma seinni vóru teir á eggini, har níggju mans vórðu loraðir niður í Hóirskor.

– Í Hóirskor tóku vit vit ein veðr, og síðani fóru vit upp í Eysturskor. Har var eisini ein veðrur, sum vit tóku, loraðu niður og sleptu, greiðir Poul Jacob Zachariassen frá, sum var við eftir veðrunum leygardagin.

Klokkan hálvgum tvey vóru menn við veðrunum í rættini.

– Vit róku allar veðrarnar oman á bakkan, har vit hava eina góða rætt, og so var bara at bíða eftir tyrluni, sum kom ein tíma seinni, sigur Poul Jacob Zachariassen.

Klokkan trý høvdu menn fingið seinasta veðrin upp í netið, sum hekk undir tyrluni og síðani settu bæði menn og tyrla kósina heim eftir.

Samstundis sum meðan tyrlan brúkti hálvan tíma um at koma til Hattarvíkar, so skuldu teir til gongu smáar 400 metrar beint upp, áðrenn teir komu til Hóirskor, har teir vóru hivaðir upp.

Um seks tíðina á kvøldi varð seinasti maðurin hivaður upp. Talan hevði verið um ein góðan dag. Bæði hvat veðrunum og eisini hvat veðrinum viðvíkti.

Nú teir stóðu á eggini og fóru at ganga heim í móti bygdini aftur, kom nakað av regni og mjørka, og tá kundu teir bara gleðast um góða dagin, har teir fingu 28 av 35 veðrum, sum hava slept út, heim við aftur.

Klokkan nærkaðist sjey, tá menn vóru aftur í Hattarvík. Nú vóru tólv tímar síðani teir fóru frá húsum, men tá høvdu veðrarnir longu bíða í hálvan triðja tíma í bygdini.



*Eisini var tíð at fáa sær ein kaffimunn*